Útvarps-stjórin heldur flaggdags-røðuna



Sunnudagin, 25. apríl verður vanliga flaggdagshaldið í Havn, og aftur hesaferð er tað Havnar Hornorkestur, sum skipar fyri.

Byrjað verður sum vant kl. 15.00, tá Hornorkestrið gongur á odda fyri skótaliðunum í skrúðgonguni oman á Vaglið, har Høgni Jensen vegna Hornorkestrið býður gestunum vælkomin.

Eftir at nakrir sangir verða spældir, er tað so flaggdagsrøðan, sum er á skránni, og verður tað í ár Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, sum skal halda hesa.

-jm

Konsert flaggdagin

Klokkan 19 flaggdagin hava Havnar Hornorkestur og samanlagda orkestrið úr Sørvági og Vestmanna konsert í Sjónleikarhúsinum í Havn.

Konsertin er liður í fyrireikingunum hjá Havnar Hornorkestri, sum í næstum fer til kapping í Glasgow,og verður skráin á konsertini tann sama, sum hon verður til kappingina í Skotlandi.

Í tíðindaskrivi verður sagt, at konsertin í Sjónleikarhúsinum byrjar klokkan 19, og at hildið verður í á leið ein tíma.

-jm

Tvær spennandi konsertir í Havn og á Toftum

Karolina Hentze er millum luttakararnar á konsertini

Leygardagin 24. apríl luttaka átta føroyskir musikkskúlanæmingar í Berlingske Tidendes Klassiske Musikkonkurrence, sum á hvørjum ári verður hildin í Det Kongelige Danske Musikkonservatorium í Keypmannahavn

KONSERT
Tíðindaskriv

Næmingar frá Musikkskúlanum hava fyrr tikið lut við sera góðum úrsliti.

Í ár eru 101 luttakarar tilmeldaðir, og kappingin er hørð, tí verður í løtuni vant sera miðvíst og intensivt. Sum ein liður í venjingini skipar Tórshavnar Musikkskúli fyri tveimum konsertum, einari í Havn og einari á Toftum, so føroyingar eisini kunnu fáa møguleika at hoyra hesi ungu talentini, áðrenn tey fara til Danmarkar.

Hesar báðar konsertirnar verða ávikavist leygardagin 17. apríl kl. 16 í Listaskálanum í Havn, og mikudagin 21. apríl kl. 19 í Fríðrikskirkjuni á Toftum.

Tey, sum hava framførslu, eru: Kristina Heinesen, Kamilla Ravnsfjall, Valborg Joensen og Mia Káradóttir á tvørfloytu, Karolina Hentze og Heini Andreasen á trompet, Jákup Lützen á violin og Mattias D. Kapnas á klaver. Jóhannes Andreasen hevur klaverfylgispælið.

Ókeypis atgongd er til báðar konsertirnar.

Vistfrøðilig vitjan

Seinast í hesum mánaðinum kemur Gunnar A. Gunnarson úr Íslendska stovninum fyri vistfrøðiligar framleiðsluhættir á vitjan í Føroyum

VISTFRØÐI
Tíðindaskriv

TÚN er íslendski stovnurin fyri vistfrøðiligar framleiðsluhættir, og í døgunum frá 26. apríl til 3. mai kemur Gunnar A. Gunnarson, stjóri, á Føroyavitjan.

Í 1998 tók TÚN stig til at dagføra íslendska standardin ájavnt við tann evropeiska standardin. Vistfrøðilig góðkenning er at sameta við ISO 9000- góðkenningar har ein framleiðari ella eitt virkið verður góðkent til at framleiða ella viðgera eftir vistfrøðiligum reglum. Flestu lond hava slíka góðkenningarstovu og summi fleiri. Hesir stovnar eru undir eftirliti av IFOAM sum er altjóða eftirlitstovnur fyri vistfrøðiligari framleiðslu. Ein vistfrøðilig góðkenning er ein góðkenning av arbeiðsmetodum sum eru eftir ávísum standardi og undir støðugum eftirliti. Framleiðari sum er góðkendur fær loyvi at merkja sínar vørur við búmerki frá tí stovni hann er góðkendur og undir eftirliti av.

Føroyar og Grønland eru eftirbátar í hesum sambandi tí hesi lond hava ongar reglur ella standard fyri vistfrøðiligum framleiðsluhættum. Heldur eingin er góðkendur í hesum londum. Tá TÚN tók stig til, at dagføra íslendska standardin bjóðaðu teir føroyingum og grønlendingum við í eitt verkætlanarstamstarv sum síðani bleiv stuðla av NORA. Verkætlanin hevur síðani hildið á, til nú Ísland hevur fingið sín standard dagførdan ájavt við EU-standardin.

Føroyingar og Grønlendingar hava framvegis ongan standard, men hava verið við í verkætlanini fyri at fáa innlit í hesi viðurskiftir. Ætlanin er at Føroyar í fyrstu atløgu gera samstarv við Íslendingar á økinum og um onkur føroyskur framleiðari ella virkið hevur áhuga í at útvega sær vistfrøðiliga góðkenning er ein møguleiki at samstarva við TÚN sum síðani góðkennur viðkomandi.

Fæst figgjarligur stuðul er ætlanin at fáa títt íslendska standardin til føroyskt mál. Tað var MBM sum tók av avbjóðingini frá TÚN og heitti síðani á undirritaða, um at verða føroyskt umboð í verkætlanarbólkinum.

Á vitjanini er ætlanin at halda almennan fund í Suðuroy, hitta umboð fyri landsstýrið og løgting, eins og viðkomandi stovnar og samstarvsbólkar sum hava áhugað ella hava verið við í verkætlanini. Á vitjanini er somuleiðis ætlanin at seta ein ella tveir inspektørar, ein umboðsmann fyri góðkenningarnevndina og ein umboðsmann fyri standardnevndina sum íslendska góðkenningarnevndin kann brúka sum staðkent umboð, um so verður, at áheitanir um góðkenning koma úr Føroyum. Seminar verða heildin fyri hesum umboðum og øðrum áhugaðum. Er tað nakar framleiðari, bóndi, virkið ella stovnur sum hevur áhuga í ella vildi fingið meir at vita um vistfrøðiliga góðkenning og arbeiðsmetodur eru øll vælkomin at seta seg í samband við undirritaða ella MBM.

Í flestum londum í vestur Evropa er vaksandi áhugi fyri vistfrøðilig framleiðslu. Serstakliga er tað Stóra Bretland, Noreg, Svøriki, Danmark og Finland sum seta sær sum mál at vaksa um vistfrøðiliga landbúnaðarframleiðslu. ES hevur í umbúna at kunngerða ein "Europcan Action Plan" um at menna og økja vistfrøðiliga framleiðslu í ES. Nakað av vistfrøðiliga framleiddum vørum eru at fáa í føroyskum handlum, men hetta er enn alt innfluttar vørur, tí enn er eingin góðkendur framleiðari í landinum.

Nýggjur lesnaður til tey yngru

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út nýggja lesivenjingarbók, Vár

Tað er Sólrún Michelsen, sum hevur skrivað, og Astrid MacDonald hevur teknað.

Hetta er onnur bókin í eini røð av ískoytislesibókum. Tann fyrsta bókin, Morgun, kom út í fjør. Tað serliga við hesum bókunum er, at tær eru prentaðar í tveimum ymiskum útgávum. Onnur løtt lisin við einari fjøður á permuni til næmingar, ið hava heldur ilt við at lesa, og hin miðal løtt við tveimum fjøðrum á permuni til teir næmingar, ið hava lætt við at lesa.

Vár er 26 blaðsíður til støddar og kastar 42 kr. Bókin fæst í sølubúðum kring landið. Hestprent hevur prentað og bundið inn.

-jm

Havnar Horn-orkestur til Glasgow

Fyrst í hesum árinum fekk Havnar Hornorkestur innbjóðing til evropeisku hornorkestur-kappingina, sum verður hildin í Glasgow í Skotlandi í døgunum 26. apríl til 2. mai.

Tikið varð av innbjóðingini og farið verður úr Føroyum hósdagin 29. apríl og orkestrið við fylgi, verður aftur í Føroyum mánadagin 3. mai.

Ferðalagið telur 41 fólk, og 34 spælarar eru í orkestrinum.

Menn frá Fiskaaling saman við fólki eitt nú frá Vónini og KJ-Hydralik hava verið í holt við at gera ein 132 metra langan søkkring á kaiøkinum í Funningsfirði. Søkkringurin bleiv gjørdur úr rørum og blivu gamlir veirar nýttir sum søkk

Fiskaaling ger royndir á streymasjógvi

Gekk alt eftir vild, festu fólk frá P/F Fiskaaling og Eystlaks í gjár ein sonevndan søkkring upp í eina alinót á norðara armi í Funningsfirði. Arbeiðið er liður í eini størri verkætlan, ið Fiskaaling fremur í samstarv við Knud Simonsen og Oystein Patursson frá Náttúruvísindadeild Fróðskaparsetursins, trol og nótavirkið Vónina, KJ-Hydraulik og Eystlaks, ið skal gera tað møguligt at ala á økjum við nógvum streymi og stórari aldu

ALING
Tíðindaskriv

Stutt fyri páskir vóru menn frá P/F Fiskaaling saman við fólki frá m.ø. Vónini og KJ-Hydralik í holt við at gera ein 132 metra søkkring á kaiøkinum í Funningsfirði. Søkkringurin bleiv gjørdur úr rørum og blivu gamlir veirar nýttir sum søkk. Ringurin skal brúkast sum søkk fyri at halda botninum á einari alinót niðri og nótina útspenta, so fiskurin hóast streym hevur so stóra rúmd sum gjørligt og skal harvið gera tað møguligt at ala á økjum við nógvum streymi og stórari aldu. Á nótini verða trýstmátarar festir, ið kunnu geva upplýsingar um, hvussu nót og botnur á nótini við søkkringi »bera sseg« í streymi og aldugangi. Á botninum undir alibrúkinum verður ein mátari lagdur, ið loypandi kann geva upplýsingar um aldu og streym, soleiðis at granskararnir við vissu kunnu vita, hvussu alinótin ber seg við ymsari streymferð og ymiskari alduhæddi. Streym- og aldumátarin er figgjaður av oljufelagnum BP, ið saman við luttakarunum eisini figgjar meginpartin av søkkringinum og hesum ítøkiliga partinum av verkætlanini.

Fiskaaling og fleiri onnur feløg hava áður roynt ymisk snið av søkkringum úr ymsum tilfari og við ymsari vekt. Sumt hevur greitt eydnast betur enn annað, men hetta er so fyrstu ferð, ið royndir verða gjørdar við hesum tilfari og at farið verður fram á vísindaligan hátt, soleiðis at álitandi skrásetingar kunnu latast øðrum og brúkast sum grundarlag undir víðari menning av útgerðini.

Royndin skal ætlandi vísa, hvussu nógv ið krevst av søkkringinum sjálvum og av forsterkningum av nótini, togum og øðrum tilfari. Útgerðin verður í fyrstu atløgu roynd uttan fisk, skuldi hon ikki hildið, seinni er so ætlanin at arbeiða víðari við aliringum við fiski í og við tíðini eisini við tyngri søkkringum enn teimum 18 kg pr. metur, ið verða brúkt hesuferð.

Henda verkætlan byggir á modellroyndir, ið vóru gjørdar av Øystein Patursson og Knud Simonsen í royndarbrunninum hjá Vónini í Fuglafirði. Hesar royndir góvu sera áhugaverdar og virðismiklar upplýsingar um, hvussu nógv streymur við ymsari ferð minkar um rúmdina í einari alinót. Men ikki fyrr enn modellroyndirnar verða yvirførdar til tað veruliga lívið fæst at vita, hvussu væl hetta samsvarar við modellroyndirnar, og hvat ið krevst av einum søkkringi og einari alinót við søkkringi, ið stendur í nógvum streymi og aldugangi. Eisini hava somu granskarar gjøgnum eitt tíðarskeið gjørt sera áhugaverdar royndir á aliøkinum hjá Gulanum á Glyvursnesi og hjá Eystlaks í Funningsfirði, har trýstmátarar hava verið festir á alinótir fyri at kanna ávirkanina á nótina av streymi.

Í hesi granskingarverkætlan eru tríggir vinnuligir samstarvsfelagar Eystlaks, Vónin og KJ-Hydraulik, ið saman við BP eru við til at figgja hana og hava teir vist sera stóran vilja og áhuga fyri at menna loysnir, ið kunnu vera við til at betra um tøknina, ið verður nýtt innan aling á streymasjógvi.



Føroysk miðnáms-útbúgving á netið

Vælumtókta FHS-útbúgvingin verður nú sum hin fyrsta føroyska miðnámsútbúgvingin bjóðað út sum fjarlestur. Tað er Føroya Handilsskúli á Kambsdali, sum hevur tikið stig til verkætlanina, ið Amerada Hess og BP-Amoco hava stuðlað fíggjarliga

ÚTBÚGVING
Tíðindaskriv

Tey, sum áður hava verið forðaði at taka eina miðnámsútbúgving ella partar av einari, hava nú fingið ein nýggjan møguleika.

Komandi skúlaár fer Føroya Handilsskúli á Kambsdali nevniliga at bjóða FHS stakgreinir sum fjarlestur. Ætlanin er at bjóða fýra ella fimm lærugreinir út um árið, og harvið skapa møguleika at taka fulla FHS útbúgving sum fjarlestur eftir tveimum árum.

Higartil hava Amerada Hess og BP Amoco veitt fíggjarligan stuðul til verkætlanina, og hevur hetta gjørt tað møguligt at fara í gongd eftir summarsteðgin.

Miðnámsskúli til øll

Við verkætlanini hava øll ein veruligan møguleika at taka eina føroyska miðnámsútbúgving. Ætlanin er at røkka einum málbólki í føroyska samfelagnum, sum í dag ikki hevur góðar møguleikar at koma á miðnámsskúla.

Hetta kunnu t.d. vera fólk á útoyggj ella fólk, sum, vegna arbeiðsstøður ella sosialar og fysiskar umstøður, ikki hava møguleika at fara á miðnámsskúla.

Eisini er hetta ein góður møguleiki hjá handils- og skrivstovulærlingum, sum ikki hava FHS frammanundan, at taka kravdu lærugreinirnar. Hetta kunnu t.d. vera lærlingar við øðrum miðnámsútbúgvingum ella 10. flokki.

FHS vælegnað

FHS er ein 1 ára miðnámsútbúgving, sum er grundarlagið undir eini 2 ára handils-gymnasialari útbúgving. FHS útbúgvingin er somuleiðis ástøðiligur partur av handils- ella skrivstovulæru. T.v.s. at eftir eitt lokið FHS prógv kanst tú fara í læru, fara víðari á HH ella steðga á og framvegis hava eina førleikagevandi útbúgving.

FHS hevur somuleiðis lærugreinir, sum eru viðkomandi fyri nógvar ymiskar málbólkar í samfelagnum. T.d. Virkisbúskap, ið fyrst og fremst snýr seg um bókhald og roknskap, Marknaðarførslu, sum er um sølu og tænastu og Kunningartøkni. Harafturat eru meiri almennar lærugreinir sum Enskt, Føroyskt, Støddfrøði og Samfelagslæra.

Fjarlesturin verður fyriskipaður sum stakgreinalestur. T.v.s., at næmingar skulu til próvtøku í øllum lærugreinum. Hetta gevur møguleikar fyri at tillaga samlaða útbúgvingarskeiðið og valið av lærugreinum hjá hvørjum ein-støkum eftir tørvi.

Nýggjar leiðir

Fjarlestur er í stórari menning og útbúgvingartilboðini floyma yvir okkum. Skúlin metir tað hava týdning, at eisini hesin útbúgvingarmøguleiki verður mentur í Føroyum, so føroyingar eru førir fyri at veita føroyingum útbúgving við fjarlestri. Við hesi verkætlan vónar Føroya Handilsskúli at menna hendan førleika.

Treytin fyri upptøku er nøktandi 9./10. floksprógv. Tað er ein fyrimunur at hava viðkomandi starvsroyndir og kunnleika til teld.

Umsóknarbløð og at venda sær til Føroya Handilsskúla á Kambsdali á 444 900 ella fh@kambsdal.olivant.fo, og á heimasíðu skúlans, sum er www.fh.fo. Umsóknarfreistin er 4. juni 2004.